# Fer at seta kanning í verk á Hotel Tórshavn

**Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, fer at kanna umstøðurnar á sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn**

SJÚKLINGAHOTELLIÐ
*Áki Bertholdsen*

Nú skulu ávísar umstøðurnar á sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn, kannast.

Tað hevur nýggi landsstýrismaðurin í heilsumálum, Bill Justinussen, sett sær fyri.

Hann sigur, at hann hevur staðfest, at tað er rættiliga stór ónøgd við ymisk viðurskifti á hotellinum og tað hevur hann tikið til eftirtektar.

Bill Justinussen sigur, at sjálvur hevur hann ikki verið á hotellinum og tí hevur hann bara frágreiðingar frá øðrum at halda seg til.

Sjálvur er hann rættiliga nýggjur í starvi sum landsstýrismaður í heilsumálum, so tað er ikki fyrrenn nú um dagarnar, at hann hevur frætt um summar av trupulleikunum, sum eru á hotellinum.

Og tað skilst, at trupulleikarnir á hotellinum kunnu býtast í tvey, tí í fyrra lagi er talan um heilsuligar trupulleikar og í



*–Tað skal ongin ivi vera um, at ongin heilsuvandi stendst av at vera á Hotel Tórshavn og tí fer Bill Justinussen, landsstýrismaður at seta eina skjóttarbeiðandi nevnd at kanna heilsuligu viðurskiftini á hotellinum*

øðrum lagi er talan um trivnaðartrupulleikar.

Og hvat teimum heilsuligu trupulleikunum viðvíkur, er tað serliga vandin fyri smittu av legionellabakterium í tí heita vatninum í húsinum, sum hotellið heldur til í, sum hevur verið frammi seinstu dagarnar. Men fólk hava eisini ampa av, at svampur er í summum av kømrunum.

Hesir trupulleikar hava ført við sær, at nøkur aftra seg við at vera á hotellinum og tað eru eisini dømi um fólk, sum eru rýmd av hotellinum.

– Akkurát hesir trupulleikarnir eru nýggir fyri mær. Men tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at allar minsti ivi um, at heilsuvandi kann standast av at vera á hotellinum, tí minsta kravið er, at fólk kenna seg púra trygg at vera á hotellinum.

Fyri at beina allan ótryggleika av vegnum, gav landsstýrismaðurin tískil týsmorgunin umsitingini í trivnaðarmálaráðnum boð um at seta eina nevnd, sum skal kanna tær heilsuligu umstøðurnar á hotellinum.

Bill Justinussen leggur dent á, at talan skal vera um eina skjóttarbeiðandi nevnd, fyri at koma ótryggleikanum til lívs sum skjótast.

Hann sigur, m.a. at embætislæknin í Keypmannahavn hevur víst á, at svampurin, sum er á hotellinum er púra vandaleysur fyri fólk.

– Men er hetta ein spurningur, sum framvegis elvir til ampa, vil eg hava trupulleikarnar kannaðar av nýggjum av eini nevnd, har eisini føroyingar eru uppi í, tí tað kann ikki góðtakast, at fólk skulu hava minsta ampa av at vera á hotellinum.

### Arbeiða alla tíðina

Hvat trupulleikunum við trivnaðinum á hotellinum viðvíkur, er tað hinvegin eitt mál, sum tey mugu arbeiða við alla tíðina, sigur Bill Justinussen.

– Men talan er um rættiliga umfatandi spurningar, sum tað tekur tíð at loysa og hóast ónøgd er við hotellið, fáa vit eisini at vita, at umstøðurnar á hesum hotellinum eru mundandi betri enn á tí gamla.

Hann sigur, at ikki slepst undan, at umstøðurnar á Hotel Tórshavn vera samanbornar við umstøðurnar á tí danska sjúklingahotellinum og tað er onki yvir at dylja, at í tí samanberingini er tað føroyska sjúklingahotellið eftirbátur.

Tó ásannar hann, at trivnaðurin hevur rættiliga stóran týdning á einum sjúklingahotelli og hann sigur, at arbeitt verður við málinum, men enn er ongin niðurstøða tikin um, hvat kann gerast.

Hinvegin vísir hann eisini á, at tað er ein spurningur, hvat vit kunnu gera við tí fíggjarliga karmi, vit hava, tí tað slepst heldur ikki undan, at útreiðslurnar til serviðgerð uttanlands er vaksin ómetaliga nógv seinastu árini og hon er nú uppi á 80 milliónum um árið- hóast hann ikki heldur, at sjúka kann gerast upp í pengum.

– Tað vil so aftur siga, at hóast mett var, at hetta nýggja hotellið nøktaði tørvin, tá ið tað varð leigað, er tað ikki vist, at tað nøktar tørvin nú.

Vit spurdu eisini landsstýrismannin, um talan ikki var um vánaliga tilrættislegging, um tað er so, at hotellið longu blivið ov lítið eftir bara trimum árum.

Men hann vil ikki gera viðmerkingar til tað, sum er gjørt, men hann sigur, at nýggir viðgerðarhættir hava ført við sær, at rættiliga nógv fleiri føroyingar verða sendir niður nú, enn tað vóru fyri bara nøkrum fáum árum síðani.

Ein spurningur, sum hevur verið leyðsliga umrøddur, er at leiga eina hædd afturat í sama húsið fyri at gera hotellið størri.

– Men er húsið í ringum standi, og umstøðurnar annars vánaligar, er tað ongin loysn at bara at gera hotellið størri. Hinvegin liggur hotellið sera væl fyri og tað hevur esini týdning fyri trivnaðin, so har eru ymisk viðurskifti at seta upp ímóti hvørjum øðrum og enn er ongin niðurstøða, sigur Bill Justinussen.

# Umstrídd kanning um fosturtøkur skal bíða

**– Kann ein móðurhjálparbólkur geva okkum upplýsingarnar, er tað ein nógv einfaldari loysn, sigur Bill Justinussen, Landsstýrismaður**

FOSTURTØKU-KANNING
*Áki Bertholdsen*

Ætlanin at gera eina kanning fyri at vita, hví føroyskar kvinnur fáa fosturtøku, verður ikki sett í verk beint nú.

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, sigur, at hann fyribils hevur gjørt av at bíða við nógv umstríddu kanningina, har ætlanin var at gjøgnumganga sjúkradagbøkur hjá kvinnum, sum hava framt fosturtøkur, fyri at vita, hvør orsøkin var til, at tær tóku hetta stigið.

Hetta merkir kortini ikki, at hann hevur slept royndini at fáa talið á fosturtøkum niður.

Tað merkir heldur ikki, at hann hevur slept ætlanini at



fáa tilfar til vega sum lýsa, hví kvinnur vilja hava fosturtøku.

– Sjálv kanningin var ikki nakað endamál í sær sjálvum. Endamálið er at fáa til vega almenn hagtøl sum vísa, hví føroyskar kvinnur fáa fosturtøku og í tí sambandi var ein kanning nevnt sum ein møguleiki fyri at fáa hesi hagtølini til

*At fáa hagtøl til vega sum lýsa orsøkirnar til fosturtøkur er framvegis ein ætlan hjá Bill Justinussen fyri at fáa at vita, hvussu stuðulstiltøk kunnu setast í verk. Men hann nú fer hann at vita um tað ikki ber til, uttan at gera nógv umstríddu kanningina*

vega.

Men hann sigur, at kanska ber tað til at fáa hesar upplýsingar til vega á ein lættari og smidligari hátt enn tað er at kanna sjálvar sjúkradagbøkurnar.

Í samgonguskjalinum stendur, at arbeiðast skal fyri at avmarka talið á fosturtøkum og hann er longu farin at fyrireika, sum skulu avmarka talið á fosturtøkum.

– Eg havi givið umsitingini í Trivnaðarmálaráðnum nakrar arbeiðsuppgávur á fosturtøkuøkið, sum umsitingin er farin í holt við og arbeiðir við.

Hann sigur, at talan er um at kanna møguleikarnar fyri at seta ein móðurhjálparbólk á stovn. Umsitingin skal eisini kanna, hvussu ein slíkur bólkur skal vera mannaður og um nakrar lógfrøðiligar forðingar eru fyri at seta ein slíkan bólk.

– Samstundis skal umsitingin kanna eftir, hvar lóggávumyndugleikin á hesum øki liggur. Hetta er ein gomul lóg og tað er ein spurningur um myndugleikin liggur í Føroyum, ella um vit mugu ígjøgnum Fólkatingið.

### Fáa hagtøl til vega

Bill Justinussen sigur, at fáa vit skipað ein móðurhjálparbólk, sum kemur uppí málið, hvørja ferð ein kvinna biður um fosturtøku, ber væl til at fáa upplýsingar um orsøkirnar tann vegin.

– Kunnu vit fáa somu upplýsingar um orsøkirnar til fosturtøku ígjøgnum ein móðurhjálparbólk, sum vit annars kundu fingið í eini kanning, er tað ein nógv einfaldari loysn.

– Hetta er ikki ein møguleiki, sum er komin mær til hugs fyrr, men ber tað til, er tað ein spurningur um, hvussu neyðugt tað er at gera eina afturlítandi kanning.

Hann sigur, at móðurhjálparbólkurin kann savna upplýsdingar saman til nøkur almenn hagtøl sum kunnu geva okkum ábendingar um, hvørji stuðulstiltøk, vit eiga at seta í verk fyri at fáa talið at fella, sigur Bill Justinussen.

Tó leggur landsstýrismaðurin afturat, at hevur ein granskingarstovnur áhuga fyri at granska spurningin og at gera eina afturlítandi kanning, fer hann sjálvsagt at arbeiða við vælvild saman við stovninum um tað, tí spurningurin er áhugaverdur.



# Politiskur meiriluti at broyta hernaðarsamtyktirnar

**Eftir at Uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum er komin til ta niðurstøðu, at hon kann ikki taka støðu til radaraútbyggingarnar, sum NATO ætlar at gera á Eiði, tí vit hava nakrar løgtingssamtyktir, sum siga, at Føroyar skulu vera leysar av øllum hernaðarvirksemi, eru stóru flokkarnir á løgtingi samdir um, at gomlu hernaðarsamtyktirnar eiga at broytast**

NATO
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Spurningurin um hernaðarligu støðu Føroya í heimssamfelagnum skal takast upp av nýggjum. Orsøkin er ítøkiliga ætlanin hjá NATO at útbyggja radarasamskiftiskervið í Norðuratlantshavi, tann sonevnda SSSB-FAR ætlanin.

Løgmaður varð kunnaður um málið, sum annars stavar heilt aftur frá 1984, fyri góðum hálvum øðrum ári síðan, og hevur síðan biðið Uttanlandsnevndina hjá løgtinginum um sítt tilmæli. Men Uttanlandsnevndin hevur víst málinum frá sær við tí grundgeving, at løgtingið tilsamans fýra ferðir, seinast í 1984, hevur samtykt, at Føroyar skulu ikki vera við í nøkrum hernaðarligum samskifti.



*Stóru flokkarnir á tingi taka undir við at broyta gomlu hernaðarsamtyktirnar um uttanveltaðu støðu Føroya*
*Savnsmynd*

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur síðan boðað frá, at spurningurin skal takast upp í einum aðalorðaskifti í løgtinginum, og síðan skal løgtingið taka støðu til hernaðarsamtyktirnar.

Men longu nú tykist meiriluti vera fyri at broyta gomlu hernaðarsamtyktirnar. Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin siga seg allar vera fyri at fremja broytingar, meðan Javnaðarflokkurin enn ikki hevur tikið støðu til málið.

Hergeir Nielsen, tinglimur fyri Tjóðveldisflokkin, sum eisini er formaður í Uttanlandsnevndini, metir, at illa ber til at halda fast við hernaðarsamtyktirnar.

- Tað ber illa til at halda fast við samtyktirnar, nú kalda kríggið er av, og hernaðarliga myndin av heiminum er so nógv broytt, sigur Hergeir Nielsen, og vísir á, at løgtingið eigur at viðgera málið í hesum ljósi.

Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum, sigur, at Fólkaflokkurin hevur eina greiða støðu í hesum mál, og vil gera alt fyri at varðveita friðin í okkara parti av heiminum. Hann metir tí, at ítøkiliga NATO-ætlanin, sum nú liggur á borðinum, er eitt gylt høvi hjá Føroyum at fáa ein virknari lut í altjóða politikki. Hann vísir á, at føroyingar alt ov leingi hava stungið høvdið í sandin og hava ikki viljað tikið støðu til mál av tílíkum slag.

- Sjálvur havi eg altíð hildið, at tað hevur verið ein óvani við hesum hernaðarsamtyktunum, sigur Óli Breckmann, og leggur afturat, at principielt hevur Fólkaflokkurin einki ímóti at broyta hernaðarsamtyktirnar.

Johan Dahl, tinglimur fyri Sambandsflokkin og limur í Uttanlandsnevndini, sigur, at Sambandsflokkurin sær ongan trupulleika í at broyta hernaðarsamtyktirnar.

- Vit noyðast at tillaga okkum nútíðina. Vit eru jú vard av NATO, skuldi okkurt borist á, og tí eiga vit eisini at vera við, sigur Johan Dahl. Persónliga heldur Johan Dahl, at tað ikki eigur at vera nakar trupulleiki fyri Føroyar at lata NATO sleppa at seta upp radarmastrar á Eiði.

Katrin Dahl Jacobsen, tinglimur fyri Javnaðarflokkin og limur í Uttanlandsnevndini, heldur eisini, at løgtingið eigur at taka støðu til hernaðarsamtyktirnar av nýggjum. Hon sigur, at enn hevur Javnaðarflokkurin ikki tikið endaliga støðu til, hvørt hernaðarsamtyktirnar eiga at broytast ella ikki, men málið verður tikið upp í flokkinum. Katrin Dahl Jacobsen metir, at NATO-málið hevur noytt føroyskar politikar at taka viðgera hernaðarligu støðu Føroya av nýggjum, og at løgtingið eftir eitt aðalorðaskifti hevur skyldu at hava eina støðu til spurningin.

### Løgmaður skal útvega fleiri upplýsingar

Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum sigur, at Anfinn Kallsberg eigur at útvega nógv fleiri upplýsingar um hernaðarmálið, enn tær, sum Uttanlandsnevndin higartil hevur fingið, áðrenn málið skal til aðalorðaskifti. Hergeir Nielsen metir, at allir viðkomandi spurningar í viðurskiftunum millum Føroyar og NATO eiga at leggjast á borðið, so til ber at fáa eitt grundleggjandi orðaskifti um alt NATO-málið.

- Eitt aðalorðaskifti er í sær sjálvum ikki nokk. Sum er hava vit bara fingið nakrar upplýsingar um hesa ítøkiligu ætlanina hjá NATO á Eiði, men vit hava framvegis tørv á upplýsingum um búskaparligu avleiðingar av virkseminum hjá NATO í føroyskum øki, bæði fyrr og eisini í framtíðini, sigur Hergeir Nielsen. Hann sigur, at fáast ikki fleiri upplýsingar á borðið, so fer hann ikki at taka undir við at loyva NATO at byggja út á Eiði.

### Málið viðgerast skjótast gjørligt

Teir fýra stóru flokkarnir eru samdir um, at løgtingið eigur at viðgera framtíðar, hernaðarligu støðu Føroya skjótast gjørligt, og meta allir, at aðalskifti eigur at vera, møguliga longu í heyst. Formaðurin í Uttanlandsnevndini hjá løgtinginum, Hergeir Nielsen, sigur, at hann, eftir vitjanina hjá danska verjumálaráðharranum, kennir tað sum um danir vilja hava at vita føroysku støðuna rímiliga skjótt.

Gestur umborð á Cruise skipið er av føroyskari ætt:

# Vil hitta familjuna í Føroyum

**Tá luksus skipið The World kemur á Havnina fríggjadagin verður tað við einum føroyskum ísletti umborð. Per Einar Skaar er kvartur skálamaður. Hann hevur sent boð eftir familjuni í Føroyum, sum kemur umborð at heilsa uppá hann, tá skipið kemur á Havnina**

FAMILJUBOND
*Heri á Rógvi*

Tá stásiliga skipið The World kemur á Havnina fríggjadagin, so verður tað við einum føroyskum ísletti umborð. Við skipinum er Per Einar Skaar. Hann eru væntandi fá, ið kenna, men hann fær fríggjadagin vitjan av umleið 40 familjulimum.

Søgan er nevniliga tann, at Per Einar Skaar er kvartur føroyingur. Abbi hansara var Hans Petur Jacobsen úr Norðhúsum á Skála.

Hesin Hans Petur Jacobsen var bestimaður á Florentz hjá Mortan í Hvannasundi. Teir fóru í januar mánað í 1920 úr Norra til Føroya við nýggju Florentz, men tá brast illveður á. Teir mistu øll seglini uttan stórseglini. Skaða kom á bæði skip og farm, og teir settu inn móti landi í syðra endanum av Norra.

Har hitti hann norsku Emmu, sum var úr býnum Lyngdal. Hann fór aftur til Føroya við skipinum, men hjarta lá so at siga eftir í Norra, og hann fór skjótt yviraftur, og hann og Emma gifust seinni.Tey fingu eitt barn – Anna Maria.

Hon verður seinni gift og fær eftirnavnið Skaar. Hans Petur doyr í 1941, tá skipið, hann var við, varð søkt av týskarum.

Annar Maria Skaar flytir saman við manni sínum, sum førdi fraktskip til USA, vesturum hav til USA, til New York, har hon búsettist. Tey fingu sonin Per Einar, sum í dag er umleið 61 ára gamal.

Mammam, Anna Maria, livir enn, og hon arbeiðir sum lækni í New York. Hon hevur regluliga samband við systkinabarn sítt, Oluffa Mikkelsen, á Skála. Emma, sum jú giftist Hans Peturi, doyði fyri tveimum árum síðani. Oluffa og børn hennara hava verið og vitjað Emmu yvir í Norra, og har hava tey eisini hitt Per Einar, sum er einabarn.



*Tað er hetta skipið, The World, ið Per Einar Skaar er við, og familja hansara fer fríggjadagin umborð*

### Til Føroya

Per Einar Skaar er vorðin múgvandi maður í USA. Hann hevur starvast sum sjónleikari, og onkur kann hava sæð hann í onkrum filmi. Oluffa minnist at hava sæð hann í onkrum filmi, tá hann hevur verið og ferðast.

Per Einar eigur fleiri hárfríðkanarstovur, eina kosmetikk fabrik og hann hevur eisini sín egna farm (stóran bóndagarð). Hann eigur íbúð í New York, har mamma hansara eisini býr. Somuleiðis eigur hann eisini eina íbúð umborð á cruise skipinum The World. Tað er hetta skipið, sum fríggjadagin kemur á Havnina.

### Sent boð

Per Einar sjálvur sendi Oluffu eitt brævi. Í brævinum boðar hann frá, at hann kemur til Føroya, og hann vil ógvuliga fegin hitta sína føroysku familju.

Familjan hevur fingið skipað soleiðis fyri, at tey fara umborð fyri at hitta Per Einar. Tey vera umleið 40 fólk, ið øll eru í familju ella gift við onkrum í familjuni hjá Per Einar. Sum gávu hava tey fingið gjørt ein málning av Skála bygd, ið Bibi Haraldsen hevur málað, og málningurin er av Skála bygd.

Tey eru sjálsagt øll sera spent og gleða seg at sleppa umborð at hitta familjulimin, ið ongantíð áður hevur verið í Føroyum. Bert mamma hansara hevur einaferð verið í Føroyum.

### Skipið

Skipið, The World, ið hesin kvarti føroyingurin er við, er ikki bara nakað heilt vanligt. Talan er um eitt spildurnýtt luksus cruise, har fólk kunnu vera fastbúgvandi í egnari íbúð. Har eru allar hugsandi – eins og óhugsandi - hentleikar.

Sambært heimasíðuni hjá skipinum eru prísirnir á íbúðunum umborð frá 17 mió til 57 mió! Tað eru 110 eigara íbúðir umborð. Íbúðirnar eru – sum kanska eisini kann vænta fyri hasar pengarnar – tað reina luksus í allar mátar.

Tú kanst eisin leiga eina suitu umborð. Fyri tann túrin, har lagt verður at landi í Føroyum, skalt tú av við í minsta lagi einar 75.000 kr., men tað kann eisini gerast rættiliga nógv dýrari. Tá er alt eisini í roknað. Hesin túrurin varðar einar tíggjutólv dagar.